## Nýggj bókarøð um føroysk evni

H.N.Jacobsens Bókahandil er farin undir nýggja bókarøð um ymisk føroysk evni. Fyrstu tvær bøkurnar í røðini eru komnar út. Onnur er um Grind og Grindadráp og hin um Føroyska List. Ta fyrru hevur Dorete Bloch, lívfrøðingur, skrivað, og hina hevur listfrøðingurin, Inger Smærup Sørensen, skrivað. Bøkurnar eru fyrst og fremst ætlaðar ferðafólki, ið hava tørv á álítandi og dagførdum upplýsingum um føroysk viðurskifti, men eru eisini áhugaverdar og viðkomandi hjá føroyingum. Tær eru á enskum og donskum.
- Okkum hevur leingi vantað tílíkar bøkur, ið viðgera evni, sum ferðafólk hava áhuga fyri, sigur Ingigerð á Trøðni, leiðari á Kunningarstovuni í Havn.

## Finnast at TV2 Radio

Vónirnar vóru stórar til TV2 Radio, tá ið táverandi stóra sjónvarpsrásin valdi at fara at gera eina útvarpsrás. Fleiri kend andlit frá sjónvarpsskýggjanum valdu nú at royna seg sum útvarpsvertar. Útvarpsrásin hevur tó verið eitt stórt vónbrot, og áhoyraratølini eru fallin sera nógv seinastu tíðina. Frá apríl til mai misti útvarpsrásin heili 131.000 dagligar áhoyrarar, soleiðis at hon nú bert hevur 203.000 dagligar áhoyrarar. Thorkild Ellerbæk, rektari á Danmark Journalisthøjskole, er einki fyri hesi útvarpsrás, og heldur ikki vánaliga gongdin kann vendast.

# Aftur til røturnar: Til Írlands á motorsúkklu



*Teir fýra, Júst Sivertsen, Niels Pauli Hjaltalin, Eirikur Ó. Simonsen og Sonne Smith gera klárt at fara við Norrønu til Skotlands*

*Mynd Jens K Vang*

**Nýggja farleiðin til Skotlands hevur vakt útferðarhugin hjá mongum føroyingum. Sjóbrúgvin til Scrabster hevur bráddliga latið nógvar nýggjar hurðar upp. Hetta hava fýra motorsúkklu"freakar" sannað, og seinasta mánadag settu teir hol á ein av sínum dreymum, nevniliga at uppliva grannalond okkara Skotland og Írland á motorsúkklu**

FERÐING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Teir fýra eru Júst Sivertsen, Niels Pauli Hjaltalin, Eirikur Ó. Simonsen og Sonne Smith.

Teir eru teir fyrstu føroyingarnir á motorsúkklu, sum nýta høvið at fara til Írlands, og teir eru teir fyrstu, sum fara í flokki til Skotlands. Hesir fýra frøast sum so nógvir føroyingar, grannar og útlendingar um stigið hjá Smyril Line at skipa rutu til Scrabster. Teir hava glett seg nógv og hava hitst viðhvørt at leggja ferðina til rættis. Skotland er fyrsta steðgistaðið, men tað, sum veruliga drívir verkið, er at koma aftur til røturnar – til landið hjá munkunum, sum sigast at vera teir fyrstu, ið festu búgv í Føroyum, Írland.

Í fyrstu atløgu verður koyrt til Inverness. Síðani gongur leiðin í ein útsynning fram við Glasgow og longri til Stranraer, haðani ferja fer til Larne ella Belfast í Norðurírlandi. Úr Stanraer til Larne eru snøgt 50 kilometrar at sigla, og inn í Belfast eru akkurát 66 kilometrar. Víðari fara teir suður um markið til lýðveldið Eire, altso Írlands.

Júst, Niels Pauli, Eirikur og Sonne hava onkuntíð sitið og hugsað um, hvørt vit eru av norskari rót. Tað verður nomið við í sanginum hjá Hans Andriasi. Kortini vita vit, at írar vóru teir fyrstu, ið búsettust í Føroyum. So nú fara teir kanska at hitta nakrar forfedrar í tí burturav vakra landinum Írlandi við tí einastandandi blíða og fyrikomandi fólkinum.

Bæði Skotland og Írland eru frálík at ferðast í. Ikki minst við motorsúkklu siga teir fýra, meðan teir kekka inn. –Vónandi kunnu vit vera við til at rudda slóð fyri øðrum, sum kunnu gera okkum hetta eftir. Sosialurin fer at hava frásagnir frá hesi spennandi og óvanligu ferð í komandi bløðum.